


# Faroe Petroleum borar í Norra

**Jan Müller**

27.08.2015 - 19:29

Oljan.fo

Oljufelagið Faroe Petroleum er nú farið undir at bora ein leitibrunn í norskum øki. Talan er um Portrush prospektið, ið liggur tætt við Njord og Draugen keldurnar. Tað er Shell, sum er fyristøðufelag. Shell eigur 40%, VNG Norge 20%, Petoro 20% og Faroe Petroleum 20% av loyvinum. Tað er pallurin Transocean Barents, sum borar. Stjórin í Faroe Petroleum, Graham Stewart, sigur, at felagið er sera nøgt við avgerðina at bora Portrush, nú tað liggur tætt við Pil og Bue fundini, sum Faroe Petroleum er partur av.